# Viðtøkur fyri Sunnbiar Sóknar Bygdasavn

§1

Sunnbiar Sóknar Fornminnafelag setir á stovn sjálvsognarstovnin Sunnbiar Sóknar Bygdasavn.

§2

Endamál stovnsins er í Sunnbiar kommunu:

- at fremja varðveitingararbeiði Sunnbiar Sóknar Fornminnafelags av fornminnum, forngripum og siðsøguligum tilfari annars við tilknýti til Sunnbiar sókn. Býtt verður upp í evni:
    1. Bygdarsøga sum heild, t.e. staðarnøvn, hús og fólkalív annars.
    2. Útróður.
    3. Bjargalív.
    4. Stórhvalaveiða.
    5. Skaldskapur.
    6. Føroyskur dansur og kvøðing.
- at savna forngripir, merkja og skráseta teir við øllum upplýsingum, sum møguligt at at fáa til vega.
- at seta upp siðsøguliga framsýning.

§3

Savnið verður stýrt av nevnd Sunnbiar Sóknar Fornminnafelags víðkað við einum limi, sum Sunnbiar Sóknar Bygdarráð tilnevnir.

Stýrið stendur aðalfundi Sunnbiar Sóknar Fornminnafelags til svars fyri ognum og rakstri savnsins.

Stýrið skipar seg sjálvt. Samtyktir verða gjørdar við vanligum meiriluta. Um atkvøðurnar standa á jøvnum, er atkvøða formansins avgerandi.

Stovnurin verður bundin við undirskrift av stýrisformanninum. Til sølu og veðsetan av fastari ogn krevst meirilutasamtykt, og undirskrift á viðkomandi skjøl av stýrisformanni og einum stýrislimi.

Roknskaparárið er álmanakkaárið.

§4

Gevst savnið við virki sínum, verður farið fram eftir §3, 3. stk. í løgtingslóg nr. 17 frá 9. mai 1972 um bygdasøvn við mentanarligum virksemi.

§5

Hesar viðtøkur eru samtyktar á stovnandi aðalfundi Sunnbiar Sóknar Fornminnafelags 18. mars 2011.

Eyðun Vestergaard

Sólfinn Gudmundsen

Maibritt úr Hørg

Sigmund Vestergaard

Fróði Thomsen

KOMIÐ
18 OKT. 2011
SØVN LANDSINS